VEÐRIÐ

Petur Skeel Jacobsen greiður frá um veðrið



Veðrið í morgin:
Gul til stívt andøvsgul av suðri og útsynningi og sólglottar, men kanska okkurt ælið. Hitin millum 14 og 17 stig.



Veðrið leygardagin:
Fleyr til gul av suðri ella av ymsum ættum og yvirhøvur turt og sólglottar. Seint um kvøldið møguliga regn. Hitin millum 12 og 15 stig.



Veðrið sunnudagin:
Fleyr til gul av ymsum ættum, turt og sólglottar, men mjørkaflókar. Hitin millum 15 og 18 stig.

Veðrið mánadagin og týsdagin:
Lot til andøvsgul millum sunnan og eystan og yvirhøvur turt og sólglottar, men mjørkaflókar. Hitin millum 15 og 19 stig.

Tá fótbólturin doyði

29. mai fyri 23 árum síðani stendur framvegis sum ein tann svartasti dagurin í fótbóltssøguni

FÓTBÓLTUR
Jákup Mørk
jakup@sosialurin.fo

39 italsk viðhaldsfólk lótu lív í ófriðinum, sum køvdi allan veitsludám, tá Europiska finalan fyri meistaralið skuldi spælast á Heysel Stadion og Brügge, Belgia, fyri júst 23 árum síðani.

Liverpool og Juventus var júst dreymafinalan, sum tey flestu høvdu vónað fór at verða, men nakra veitslu gjørdist talan ongan tíð um.

Sjónvarpsmyndirnar av kroystu viðhaldsfólkunum, sum endaðu undir einum trygdarmúri, ferðaðust kring allan heimin, og leingi var spurningurin, um dysturin yvir høvur skuldi spælast.

Saman við dómaranum avgjørdu liðskipararnir hjá feløgum tó, at búrkropparnir ikki skuldu vinna á fótbóltinum, og tí fóru liðini út á vøllin.

Sjálvur dysturin endaði við 1-0 sigri til Juventus, eftir at Platini setti brotsspark í netið, eftir at Boniek varð feldur – uttan fyri kriminella feltið.

Meira enn úrslitið var tað tó eftirspælið av hesum, sum stóð á breddanum komandi tíðina. Ensk lið fingu fimm ára bann frá europiskum fótbólti. Eitt bann, sum í mangar mátar steðgaði menningini av enskum fótbólti, sum ikki fyrr enn seinnu árini veruliga hevur vunnið seg aftur á europisku tindarnar.

Men samstundis markeraði hetta eisini eina støðu, har fótbóltsheimurin segði nei til búrkropparnar kring vøllin. Og hóast tað enn er nakað eftir á mál, so er trupulleikin við hooliganismu í mangar mátar minni í dag, enn hann var fyri 23 árum síðani.

Myndirnar av vanlukkuøkinum á Heysel ferðaðust kring allan heimin
Mynd: Polfoto/AP

Hitalagið kring knøttin

Illulisat	5
Nuuk	8
Qaqortoq	10
Ammassalik	5
Saint John's	--
Halifax	--
Reykjavík	13
Seyðisfjørður	10
Tórshavn	8
Lerwick	12
Aberdeen	13
London	16
Tromsø	--
Bergen	15
Oslo	--
Stokkhólm	17
Keypmannah.	17
Helsinki	17
Moskva	13
Berlin	18
Warzawa	15
Kiev	9
Bukarest	20
Paris	20
Madrid	14
Róm	27
Malorca	22
Athen	26
Malta	24
Tunis	31
Beijing	29
New Dehli	21
Bangkok	33
Jakarta	32
Sydney	19
New York	23
Miami	28
Los Angeles	16
Meksikobýur	--
Panama	--
La Paz	12
Rio de Janeiro	--
Buenos Aires	12

LUFTTRÝSTIÐ



Í gjár:
Eitt lágtrýst, 1004 hPa. yvir Skotlandi fer í útnyrðing og brúgvalagið við Føroyar fer spakuliga norðureftir



Í dag:
Lágtrýstið vestan fyri Føroyar fer norðureftir og brúgvaxlagið hvørvur í útnyrðing

HITALAGIÐ



Hitalagið mált frá 25/5 kl. 06^{00} – 26/5 06^{00}. Hitin í gjár: 7,9°
Minsti hiti máldur í mai: -9,9° - Mesti hiti máldur í mai: 18,3°

AVFALLIÐ



Avfallið: 0,0 mm – mált frá 25/5 kl. 06^{00} – 26/5 06^{00}.
Avfallið higartil í mai: 15 mm

I EINUM SAMFELAG
HAR TEY VEIKASTU
HAVA TAÐ GOTT,
HAVA ØLL TAÐ GOTT

WWW.JAVNI.FO

JAVNI

VESTFALLSKYRRINDI

20. mai Mánin longst frá jørðini
28. mai Seinna kvarter
3. juni Tendring / Mánin næstur jørðini

Kelda: Almanakkin 2008

Dagur	Suðuroyar-/Vágafirði fp.	Suðuroyar-/Vágafirði sp.	Skúvoyar-/Skopunarfirði fp.	Skúvoyar-/Skopunarfirði sp.	Hestfirði/Sundalagnum fp.	Hestfirði/Sundalagnum sp.	Vestmanna-sundi fp.	Vestmanna-sundi sp.	Mykines-firði fp.	Mykines-firði sp.	Nólsoyar-firði fp.	Nólsoyar-firði sp.	2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp.	2 fj. í LS úr Mjóvanesi sp.	Leirvíksfirði/Haraldssundi fp.	Leirvíksfirði/Haraldssundi sp.	Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp.	Kalsoyar-/Svínoyarfirði sp.	Hvanna-sundi fp.	Hvanna-sundi sp.	Fugloyar-firði fp.	Fugloyar-firði sp.
29. mai	2:24	14:58	1:24	13:58	1:39	14:13	4:24	16:58	5:24	17:58	0:39	13:13	-	12:13	2:39	15:13	3:39	16:13	2:09	14:43	3:24	15:58
30. mai	3:18	15:39	2:18	14:39	2:33	14:54	5:18	17:39	6:18	18:39	1:33	13:54	0:33	12:54	3:33	15:54	4:33	16:54	3:03	15:24	4:18	16:39
31. mai	4:01	16:23	3:01	15:23	3:16	15:38	6:01	18:23	7:01	19:23	2:16	14:38	1:16	13:38	4:16	16:38	5:16	17:38	3:46	16:08	5:01	17:23
1. juni	4:47	17:11	3:47	16:11	4:02	16:26	6:47	19:11	7:47	20:11	3:02	15:26	2:02	14:26	5:02	17:26	6:02	18:26	4:32	16:56	5:47	18:11
2. juni	5:38	18:05	4:38	17:05	4:53	17:20	7:38	20:05	8:38	21:05	3:53	16:20	2:53	15:20	5:53	18:20	6:53	19:20	5:23	17:50	6:38	19:05